## Bayern yvirgevur seg

Um vikuskiftið tapti FC Bayern ímóti Schalke á heimavølli, og eftir dystin viðurkennir Franz Beckenbauer, at Bayern fer ikki at røkka týska meistaraheitinum í ár. - Vit í Bayern eru beskðin. Nú fara vit at stríðast fyri at vinna næstfremsta plássið í kappingini. Vinna vit ikki næsta dyst, so sær tað svart út fyri venjaran, og tað veit hann eisini væl, sigur Beckenbauer við Kicker.



## Zola heldur fram í West Ham

Fyrrverandi italski stórspælarin Gianfranco Zola hevur klárað seg væl sum venjari hjá enska felagnum West Ham. Zola spældi í síni tíð fyri Chelsea, og stórfelagið hevur verið áhugað í at gera Zola til nýggjan venjara í felagnum í summar. Men nú hevur Zola skrivað undir nýggjan sáttmála við West Ham, og sambært sáttmálanum heldur Zola fram í felagnum til 2013.

# Pál Joensen við í 14 kappingum

**Tilsamans eru føroysku svimjararnir við í 31 ymsum kappingargreinum á Oyggjaleikunum á Álandi, og tá eru stafettirnar ikki taldar við. Oftast í hylinum verður Pál Joensen, sum er við í tilsamans 14 kappingum**



SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá svimjararnir skulu takast út til einar oyggjaleikir, er tað altíð eitt stórt putlispæl, ið skal fáast at ganga upp, áðrenn nøvnini endaliga kunnu setast á tey, sum skulu umboða Føroyar.

Eitt er, at svimjararnir eru nógvir í tali og somuleiðis kappingarnar, har teir skulu royna at klára kravtíðirnar, men nógvar aðrar fasettir í spælinum gera seg eisini galdandi.

Bara tað við kravtíðunum er nú nakað fyri seg, tí í høvuðsheitum verður tann meginregla fylgd, at bronsutíðin frá undanfarnu leikum er kravtíðin hesa ferð, men eisini har kunnu vera neyðug frávik.

Dømi um tað er 50 metra teinurin í firvaldssvimjing hjá monnum, har tað á Rhodos vóru tveir, sum vunnu silvur við somu tíð, og tí var eingin bronsutíð tá. Í hesum føri er so fjórðbesta tíðin á Rhodos sett sum kravtíð hesa ferð.

### 12 eru tikin út

– Vit leggja dent á, at ein ávísur aktualitetur er í tíðunum, sum svimjararnir verða meldaðir til við, so tí er hesa ferð eingin tíð, sum er eldri enn 1. september í fjør, sigur Rókur í Jákupsstovu, formaður í landsliðsnevndini.

– Svimjararnir hava tí havt gott og væl eitt hálvt ár til at klára kravtíðirnar, og endabresturin var so fyri viku síðani, tá Oyggjaleikaúttøkustevnan var í Havn, har svimjararnir fingu ein allarseinasta møguleika at svimja seg til Oyggjaleikirnar á Álandi.

Nú tann kappingin er farin aftur um bak og somuleiðis freistin er farin, er funnið fram til 12 svimjarar – átta kvinnur og fýra menn – sum skulu umboða Føroyar á Álandi í summar.

Úttiknu kvinnurnar eru Malan V. Bærentsen, Birita Debes, Shaila millum Garðarnar, Guðrun H. Jacobsen, Katarina Lamhauge, Poula Ø. Mohr, Bjørg Seloy og Mona Simonsen. Og teir fýra menninir eru Kári J. á Høvdanum, Pál Joensen, Pauli Ø. Mohr og Andrass Thomsen.

### Góðar tíðir

Á yvirlitinum aðrastaðni á hesi síðu síggjast gull-, silvur- og bronsutíðirnar frá Oyggjaleikunum á Rhodos, kravtíðirnar, umframt føroysku svimjararnir og tær tíðir, teir eru tilmeldaðir við.

Tilsamans eru føroyskir svimjarar við í 31 kappingum, og í 16 av teimum eru tveir føroyingar við. Einastu kappingargreinar, sum eru uttan føroyskar svimjarar, eru 200 metra firvaldssvimjing og 200 og 400 metra blandað svimjing hjá kvinnum.

Sum sæst, verður Pál Joensen tann av øllum, ið fær mest at gera, tí hann er við í ikki færri enn 14 kappingargreinum. Og tá eru stafettirnar ikki taldar við, so tað verður ikki meira enn so, at hann verður at síggja uppi á turrum á Álandi.

Føroysku tilmeldingartíðirnar eru rættiliga góðar, og í ikki færri enn 12 førum høvdu tær rokkið til gull fyri tveimum árum síðani. Framstigini eyðsýnd, men eftir stendur bert at síggja, hvørji framstig aðrir svimjarar hava gjørt síðani Oyggjaleikirnar á Rhodos.

### Svimjilandsliðið til Oyggjaleikirnar á Álandi

| Grein | Gull | Silvur | Bronsa | Kravtíð | Føroyar #1 | | Føroyar #2 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 50 metra frísvimjing | 27.24 | 27.43 | 27.73 | 27.73 | Shaila millum Garðarnar | 26.49 | Guðrun H. Jacobsen | 26.66 |
| 50 metra frísvimjing | 23.58 | 23.84 | 23.96 | 23.96 | Pauli Ø. Mohr | 23.74 | Pál Joensen | 24.00 |
| 50 metra bringusvimjing | 34.76 | 34.78 | 35.36 | 35.36 | Malan V. Bærendsen | 34.74 | Katarina Lamhauge | 34.97 |
| 50 metra bringusvimjing | 30.17 | 30.82 | 30.84 | 30.84 | Pál Joensen | 30.39 | | |
| 50 metra ryggsvimjing | 30.56 | 31.28 | 31.82 | 31.82 | Birita Debes | 30.41 | Poula Ø. Mohr | 30.83 |
| 50 metra ryggsvimjing | 26.91 | 27.13 | 27.14 | 27.14 | Kári J. á Høvdanum | 26.11 | | |
| 50 metra firvaldssvimjing | 29.47 | 30.07 | 30.32 | 30.32 | Shaila millum Garðarnar | 29.85 | Guðrun H. Jacobsen | 29.88 |
| 50 metra firvaldssvimjing | 25.30 | 25.95 | - | 26.60 | Pál Joensen | 25.83 | Kári J. á Høvdanum | 26.47 |
| 100 metra frísvimjing | 58.30 | 59.30 | 59.65 | 59.65 | Shaila millum Garðarnar | 58.21 | Guðrun H. Jacobsen | 1:00.63 |
| 100 metra frísvimjing | 51.79 | 52.59 | 53.71 | 53.71 | Pál Joensen | 51.82 | Pauli Ø. Mohr | 52.76 |
| 100 metra bringusvimjing | 1.14.76 | 1.15.97 | 1.16.04 | 1.16.04 | Malan V. Bærendsen | 1.15.04 | Katarina Lamhauge | 1:16.11 |
| 100 metra bringusvimjing | 1.04.77 | 1.06.24 | 1.07.74 | 1.07.74 | Pál Joensen | 1.07.20 | | |
| 100 metra ryggsvimjing | 1.03.97 | 1.06.69 | 1.07.14 | 1.07.14 | Bjørg Seloy | 1.05.83 | Birita Debes | 1:07.54 |
| 100 metra ryggsvimjing | 57.54 | 58.94 | 59.45 | 59.45 | Kári J. á Høvdanum | 56.13 | | |
| 100 metra firvaldssvimjing | 1.04.96 | 1.05.91 | 1.06.86 | 1.06.86 | Shaila millum Garðarnar | 1.06.47 | Bjørg Seloy | 1:08.30 |
| 100 metra firvaldssvimjing | 56.09 | 57.10 | 57.32 | 57.32 | Pál Joensen | 56.52 | Kári J. á Høvdanum | 00:58.27 |
| 100 metra blandað svimjing | 1.04.91 | 1.08.18 | 1.08.48 | 1.08.48 | Poula Ø. Mohr | 1:10.01 | | |
| 100 metra blandað svimjing | 59.04 | 1.00.48 | 1.00.98 | 1.00.98 | Pál Joensen | 58.89 | | |
| 200 metra frísvimjing | 2.04.70 | 2.05.35 | 2.06.42 | 2.06.42 | Mona Simonsen | 2:09.88 | | |
| 200 metra frísvimjing | 1.53.60 | 1.54.16 | 1.54.69 | 1.54.69 | Pál Joensen | 1.46.61 | Andrass Thomsen | 1:57.24 |
| 200 metra bringusvimjing | 2.38.24 | 2.42.90 | 2.44.38 | 2.44.38 | Malan V. Bærendsen | 2.41.84 | Katarina Lamhauge | 2:42.40 |
| 200 metra bringusvimjing | 2.22.36 | 2.22.51 | 2.26.66 | 2.26.66 | Pál Joensen | 2.22.49 | | |
| 200 metra ryggsvimjing | 2.18.59 | 2.20.31 | 2.21.70 | 2.21.70 | Bjørg Seloy | 2:27.32 | Birita Debes | 2:29.53 |
| 200 metra ryggsvimjing | 2.04.89 | 2.06.00 | 2.06.10 | 2.06.10 | Kári J. á Høvdanum | 2.05.13 | | |
| 200 metra firvaldssvimjing | 2.03.07 | 2.04.62 | 2.13.98 | 2.13.98 | Pál Joensen | 2.06.27 | | |
| 200 metra blandað svimjing | 2.09.68 | 2.09.77 | 2.09.81 | 2.09.81 | Pál Joensen | 2.06.97 | | |
| 400 metra frísvimjing | 4.20.47 | 4.26.17 | 4.27.54 | 4.27.54 | Mona Simonsen | 4.29.25 | | |
| 400 metra frísvimjing | 4.00.23 | 4.04.08 | 4.06.15 | 4.06.15 | Pál Joensen | 3.42.57 | Andrass Thomsen | 4:04.30 |
| 400 metra blandað svimjing | 4.33.15 | 4.34.28 | 4.35.31 | 4.35.31 | Pál Joensen | 4.33.06 | | |
| 800 metra frísvimjing | 9.01.58 | 9.04.63 | 9.10.50 | 9.10.50 | Mona Simonsen | 9.02.66 | | |
| 1500 metra frísvimjing | 15.48.25 | 16.11.33 | 16.21.16 | 16.21.16 | Pál Joensen | 14:39.99 | | |